Álit

í

løgtingsmáli nr. 94/2020: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald (Rætting viðvíkjandi striking av § 3 c)

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Jørgen Niclasen, hevur lagt málið fram 5. mars 2021 og eftir 1. viðgerð 9. mars 2021, er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 11. mars 2021.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við landsstýrismannin í fíggjarmálum, Jørgen Niclasen.

Ein samd nevnd vil vísa á, at endamálið við uppskotinum er at strika eina sólseturáseting í eini broytingarlóg, ið varð samtykt í 2018, um at § 3 c í meirvirðisgjaldslógini fer úr gildi 31. mars 2021.

Verður hendan sólseturásetingin í broytingarlógini frá 2018 ikki strikað, so verður broytingin í § 3 c í meirvirðisgjaldslógini, sum Løgtingið við løgtingsmáli nr. 67/2020 samtykti tann 18. februar 2021, ikki galdandi eftir 31. mars 2021, sum ætlanin annars er, at hon skal vera.

Aksel V. Johannesen, Páll á Reynatúgvu og Ruth Vang hava harumframt hesar viðmerkingar:

Avgjaldspolitikkurin eggjar føroyingum at keypa plug-in hybridbilar. Tað fer uttan iva at seinka grøna orkuskiftinum, tí plug-in hybrid eru ikki útlátsfríir bilar. Tí verður mælt landsstýrismanninum til at strika mvg-afturberingina til plug-in hybrid bilar.

Við hesum viðmerkingum tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Fíggjarnevndin, 18. mars 2021

Magnus Rasmussen formaður	Aksel V. Johannesen næstformaður	Jákup Mikkelsen
Bill Justinussen	Kristin Michelsen	Páll á Reynatúgvu
	Ruth Vang	